# Real Madrid leikarar fáa bót

Julio Baptista og Robinho vóru ov seinir aftur til kongaliga felagið í spania, eftir at teir høvdu verið við landsliði teirra (Brasilia), og standa báðir nú til at fáa bøtur. Real Madrid kunnger á heimasíðu síni, at kanningar av hendingini eru í gongd, viðvíkjandi bótum til leikararnar báðar. Flogfarið úr Sao Paolo í Brazil varð seinkað, men tað fortaldi ongin teirra felagi sínum. Seinkingin hevði við sær at, at Robinho og Baptista ikki náddu til venjing í Madrid, fríggjadagin, undan dystinum ímóti Espanyol. Báðir vórðu settir av liðnum.



# Beckham vælkomin í Ipswich

Fótbóltsikonið David Beckham hevur orsakað av skaðum, ikki havt nógva spælitíð, síðan skiftið frá Real Madrid til L.A. Galaxy, og tá kappingarárið er av í amerika, eru heili fýra mánaðir langur steðgur, og hetta hevur fingið Beckham at úttala seg um hvussu gott tað hevði verið, um hann slapp at venja seg í form aftur, í vetur, við onkrum enskum liði. Beckham ætlar sær at koma í form, so at hann kann verða valdur til enska landsliðshópin, ið møguliga megnar at spæla seg til EM-endaspælið á sumri, næsta ár. Jim Magilton, venjari hjá Ipswich sigur seg heldur enn gjarna hava Beckham at venja við sínum liði. Ipswich eru í løtuni í miðjuni á stigatalvuni í næstbestu ensku deildini – The Championship.

# Islands Badminton Event 2007




*Guri Poulsen og Brynhild Carlson í dysti á Islands Badminton Event 2007*

**Badmintonkappingin er av á hesum sinni, og ikki kann sigast annað, enn at føroyingar hava verið í heiðursmerkjahýri. –Hetta eru bestu leikir nakrantíð hjá Føroyum, og eru vit bæði stolt og ovurfegin, fortelur ein glaður Tobias Effersøe, landsliðsvenjari**

BADMINTON
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

### Heiðursmerkini

Føroyska badmintonlandsliðið hevur megnað at vunnið flerir heiðursmerkir á leikunum í Grønlandi. Heili 5 heiðursmerkir blivu tað til og vóru tær deildar yvir; eitt gull-, tvey silvur- og tvey bronsuheiðursmerkir.

### Harradouble

Í harradouble megnaðu vit at vinna eitt bronsu heiðursmerki. Flóvin Mikkelsen og Aksel Poulsen framdu eitt satt bragd, áðrenn hálvfinaluna. Teir vunnu á tveimum sera stinnum og royndum leikarum frá Gotlandi.

Í hálvfinaluni fingu okkara menn tó ongantíð fatur í okkara egna spælið, ið hevði borið okkum fram gjøgnum kappingina, t.e., tað áleypandi spælið við ovmikið av smash-um. Tað verður fortalt úr Grønlandi, at tað ikki bara vóru okkara, ið ikki fingu spælið at glíða, tað var eins væl orsakað av at mótstøðan megnaði at leggja eitt stórt press á okkara menn, ið teir ikki megnaðu at knúgva.



*Sigrun Smith, gullvinnarin fyri Føroyar á leikunum í Grønlandi*

### Harrasingle

Í harrasingle eydnaðist tað øllum at koma víðari frá bólkunum. Tíverri møttu Aksel Poulsen og Rógvi Poulsen hvørjum øðrum, í fyrsta dysti aftaná bólkaspælið.

Í fjórðingsfinaluni høvdu vit heili tríggjar spælarar – Aksel Poulsen, Niclas Eysturoy og Flóvin Mikkelsen. Serliga Niclas var sera tætt uppá at koma víðari, men mátti taka til takkar við einum tapi í trimum settum, ímóti einum sera vælleikandi Bjørn Erikson frá Gotlandi – kanska besti leikarin á harrasíðuni í kappingini.

Úrslitið gjørdist 1-2 (21-15, 19-21 og 17-21).

Flóvin og Aksel spældu báðir ein frálíkan dyst, men vórðu endaliga útslignir av ávíkavist sig slået i to sæt af Jonas Anderson (Gotland) og Bror Madsen (Grønland).

Úrslitið hjá Flóvin varð 0-2 (14-21 og 15-21), og úrslitið hjá Aksel varð 0-2 (16-21 og 12-21).

### Damudouble

Í damudouble vunnu Sigrun Smith og Guri Poulsen ímóti tveimum frá Isle Of Man. Gamaní blivu tað til trý sett, men tað var fult kontrol á teimum báðum settunum, sum okkara vunnu. Í finaluni taptu okkara móti Mille Kongstad og Aviaaja Greilser frá Grønlandi. Úrslitið varð 2-0 (22-20 og 21-16). Møguliga taptu vit, orsakað av at fyrireikararnir ikki høvdu fortalt okkum, at teir høvdu framskundað skránna, við tveimum tímum, fyrr enn 5-10 min., áðrenn vit skuldu byrja.

### Damusingle

Í damsingle vunnu vit gullheiðursmerkið, ið vit høvdu vónað, men ikki tordu rokna við. Sigrun Smith leveraði ein kanón tendraðan innsats, har tað vórðu knýttir nevar eftir hvønn einstakan vunnanbólt.

Hon vann í tveimum settum móti Mille Kongstad úr Grønlandi, ið ongantíð fekk frið at spæla sítt spæl, og hon gjørdist eisini tíðuliga arg yvir at Sigrun bleiv við at fáa fatur á hennara bóltum. Sigrun vann 2-0 og settini vóru (21-11 og 21-14).

### Mixdouble

Í mixdouble eydnaðist tað Sigrun Smith og Rógva Poulsen at vinna eitt bronsu heiðursmerki. Tey taptu í tveimum settum móti tveimum sterkum Isle of Manspælarum, ið heldur óvæntað, ikki vunnu finaluna.

Rógvi og Sigrun spældu frálíkt, men høvdu ikki orduliga nakað mótspæl til skjóta og flata spælið hjá mótstøðuni. Úrslitið varð 2-0 (21-15 og 21-18).

### Samtalt

Samlaða heiðursmerkjatalið varð fimm í tali, og er tað størsta talið nakrantíð í oyggjaleikahøpi. Býtið av heiðursmerkjunum varð: tvær bronsu, tvær silvur og eina gull.

# Challenge Trophy Cup 2007

**Føroyska hondbóltslandsliðið hjá monnum er í hesum døgum ávegis til Luxemburg, har teir á fyrsta sinni luttaka í Challenge Trophy Cup. Kappingin verður frá 23.-28. oktobuer**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Føroyska manslandsliðið í hondbólti fer í kjalavørrinum hjá kvinnulandsliðinum, at luttaka í Challenge Trophy Cup. Hetta er ein kapping, ætlað smátjóðum innan hondbólts ítróttina. Kappingin byrjar í dag, 23. og er liðug sunnudagin, 28.

Ferðalagið fór longu úr Føroyum sunnudagin 21. og steðgaðu teir í Helsingør, har tveir av okkara leikarum spæla til dagligt. Ætlanin er at teir skulu spæla ein venjingardyst í Helsingør, fyri at samansjóva hópin.

Úttiknu leikararnir eru:
Heini Hanussarson, Elite 3000 Helsingør
Rókur Akralíð, Elite 3000 Helsingør
Carl Herup Olsen, Neistin
Ingi Olsen, Neistin
Dann Thorleifson, Neistin
Tróndur Kragesteen, Neistin
Janus Sørensen, H71
Esbern Patursson, H71
Dánjal Tórgarð, H71
Levi Nybo, H71
Rógvi Weihe, KÍF
Sámal Joensen, VÍF
Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil
Hjalti M. Jacobsen, Kyndil
Janus Einar Sørensen, Kyndil
Lars Black, Kyndil
Magnus Matras, Kyndil